

Á HTM er eitt fulltíðarstarv á goymsluni leyst at seta 1.mars ella sum skjótast.

# Goymslufólk til Hjálpartólamiðstøðina

**Ert tú maður/kvinna, sum hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar? - ja so hava vit júst brúk fyri tær!**

**Høvuðsinnihaldið í starvinum er**
- reingerð av endurnýtslu-hjálpartólum

**Annars eru uppgávurnar**
- skipan av goymslu
- avgreiðsla av hjálpartólum
- skráseting av hjálpartólum
- smávegis umvælingar av hjálpartólum

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga, sum hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- góðan ordan
- góð samstarvsevnir
- kunnleika til teldur á brúkarastøði
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum

**Vit kunnu bjóða**
- fast starv
- flextíð
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- førleikamenning

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn.
ella við telduposti til: htm@almannastovan.fo.

**Umsóknarfreist**
22. februar 2007 kl. 14.00.

htm@almannastovan.fo · www.almannastovan.fo

HTM

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM. Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.: 1) upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar. 2) útlán og endurnýtslu av hjálpartólum. 3) viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar. 4) tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis.

KREA.FO - TEL 47 80 80

# Bókhalds- og roknskaparfólk
## til P/F Statoil Føroyar

Søkt verður eftir fólki við bókhalds- og roknskaparførleika til støðroknskapardeildina hjá P/F Statoil Føroyar í Tórshavn. Talan er um eitt avloysarastarv í fyribils 6 mánaðir.

Støðroknskapardeildin hevur sum endamál at veita roknskapartilfar til leiðslu og støðleiðarar, umframt at gera umsitingarligar uppgávur fyri støðirnar.

**Starvið**
Arbeiðið fevnir um:
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði
- Ymiskar uppgerðir
- At veita hjálp til gerð av roknskapum

**Vit bjóða**
Tann ið settur verður, kemur at vera ein partur av toyminum á støðroknskapardeildini. Vit kunnu bjóða eitt starv í einum dynamiskum og mennandi umhvørvi. Lønin verður ásett sambært avtalu.

**Førleiki**
Vit sóknast eftir einum ágrýtnum starvsfelaga, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og sum sær týdningin av at veita eina góða tænastu til teir áhugabólkar, ið eru knýttir at støðroknskapardeildini.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Boga P. Nielsen roknskaparleiðara fyri Statoil-støðirnar á tlf. 343500.

Umsóknarfreistin er 28. februar.
Umsóknin skal sendast til:

**P/F STATOIL FØROYAR**
Fíggjardeildin
Vestara Bryggja 2
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða um 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av fremstu málum okkara.

STATOIL



# SETHÚSINI Í TORFINSGØTU 25, TÓRSHAVN TIL SØLU

Sethúsini í Torfinsgøtu 25, Tórshavn er til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøkið er 481 m2. Húsini eru í tveimum hæddum, ið hvør er uml. 100 m2. Húsini er bygd í 1963, og liggja væl fyri í vesturbýnum í friðarligum umhvørvi.

### Í húsinum er:
**Miðhædd:** Durur, gongd, køkur, spísistova, dagligstova, baðirúm, hjúnarúm og tvey kømur.
**Kjallarahædd:** Íbúð við duri/gongd, køki, spísistovu, dagligstovu, baðirúmi og kamari, umframt vaski- og fýrrúmi og garasju.

Fleiri myndir av húsunum eru á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

Áhugaði kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge, adv., jjl@lawfirm.fo ella Sigrid Midjord, skrivara, sm@lawfirm.fo

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR




Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA